

# Kuril á tilkallingarskipanini

**Leygardagin brann bygningurin hjá MBM fóður í Kollafirði í grund. Bert tveir sløkkiliðsmenn frá sløkkiliðnum í Kollafirði vóru komnir á staðið tá sløkkiliðið í Havn kom. Hetta komst av eini fløkju í tilkallingarskipanini**

ELDSBRUNI
*Orð: Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Bygningurin hjá MBM fóður í Kollafirði brann leygardagin í grund. Sjálv orsøkin til eldsbrunan er ikki staðfest enn.

Klokkan 12.09 fekk Brandstøðin í Havn boð um stóra eldsbrunan í MBM fóður í Kollafirði. Og 10 minuttir seinni var sløkkiliðið á staðnum.

– Tá vit komu úr tunlinum í Kollafirði, sá eg beinanvegin, at tað fór ikki at bera til at sløkkja eldin inni frá. Vit sóu eldin ígjøgnum taksvindeyguni, sum longu tá helst eru brostin, sigur Hans David Hansen, varasløkkiliðsstjóri á Brandstøðini í Havn.

Hans David Hansen var fyrsti sløkkiliðsmaður á staðnum úr Havn, og sigur hann, at tað gekk væl at sløkkja tá hugsað verður um umstøðurnar.

## Tilkallingarskipanin

Bert tveir sløkkiliðsmenn úr Kollafirði vóru komnir til, tá sløkkiliðið úr Havn kom á staðið. Júst hví so er, er ilt at siga, men upplýst verður av politistøðini í Havn, at tað vóru onkrir trupulleikar við tilkallingarskipanini, sum tó vóru upprættaðir beinanvegin.

– Vit byrjaðu at sløkkja úti frá, tí tað var so heitt og vit sluppu ikki inn í bygningin. Nóg mikið av vatni var, bæði frá brandpostum og úr sjónum, greiðir Hans David Hansen frá.

Eldurin, sum kyknaði í niðara enda oman ímóti sjónum, varð sløktur um 16.30-17 tíðina leygardagin. Men sløkkiliðs menn úr Kollafirði vóru á staðnum heilt til á midnátt.

Aftur sunnumorgunin klokkan 11 vórðu boð eftir sløkkiliðsmonnunum í Kollafirði, tí tá var eldurin kyknaður uppaftur.

– Tað var nógvur vindur leygardagin, og tá talan er um hoyggj, sum er savnað í so stórum mongdum liggur tað og gløðir leingi. So skal lítið til áðrenn ein glóð kann gerast stór og festa í aftur.

Húsini, sum standa næst bygninginum, vóru eisini køld niður av trygdarávum, men tey vóru ongantíð í veruligum vanda. Hans David upplýsir, at tað byrjaði at gerast heitt inni í nøkrum húsum, men lítið skal til áðrenn hitin kemur inn, tí stráluhitin var nógvur.

## Kanna orsøkina

Í gjár, mánadag, skuldi kanningararbeiðið eftir ætlan byrja. Politiið í Havn fær hjálp úr Danmark frá Kriminaltekniskudeild í Ålborg, umframt ein maður frá Dansk Brandteknisk Institut eisini er við.

– Ongin orsøk er staðfest enn, men hetta verður arbeitt víðari við, sigur Bergleif Brimvík á kriminaldeildini á politistøðini í Havn.

Menninir úr Danmark, sum eru serkønir á økinum, skuldu koma við flogfari úr Danmark í gjár, og tá skuldi kanningararbeiðið byrja sum skjótast.

Virði fyri nakrar milliónir er farið fyri skeytið. Eirikur Thorvaldsson, stjóri á MBM, hevur sagt við Útvarpið, at ætlanin er at byggja bygningin uppaftur sum skjótast. Sjálvur bygningurin er eini tríggjar milliónir verdur, umframt vøran, sum var á goymslu.







# Eldur í bili



ÓHAPP/ELDSBRUNI
*Ingrid Bjarnastein*

Fríggjadagin var eitt ferðsluóhapp vegamótið Hvítanesvegur-Vegurin Langi. Talan var um tveir bilar, sum vóru á veg norðureftir. Tann fyrsti bilurin blinkar inn til vinstru ímóti Vegnum Langa, og tann seinni bilførarin er óansin og rennir inn í reyvina á fremra bilinum. Ferðin var rættiliga nógv, og stoyturin harður. Eldur kyknaði beint eftir í motorrúminum. Politiið kom á staðið og royndi fyrst at sløkkja við vanligum eldsløkkjara, men tað vísti seg ikki at vera nóg mikið. Brandbilurin varð tí boðsendur at basa eldinum, men bilurin fekk stóran skaða á motorrúmið. Hvør orsøkin til eldin er, er ikki greitt enn, men bilurin er sendur á Bileftirlitið, har hann skal kannast.

# Álopin av tveimum monnum

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Um fimm tíðina sunnumorgunin var ein maður álopin í Magnus Heinarsonargøtu í Havn. Maðurin, sum fylgdist við eini kvinnu, varð álopin beint uttanfyri Tórshøll.

Tveir mans løgdu á mannin, og teir sparkaðu og bukaðu hann, so hann breyt nøkur rivjabein. Eisini høvdu teir sligið høvdið á honum ítmóti einum stórum handilsvindeyga, men tíbetur brotnaði vindeygað ikki, verður upplýst av politistøðini í Havn.

Menninir, sum løgdu á mannin, høvdu eisini bukað høvdið á manninum niður í vegin, og teir høvdu gingið aftaná kvinnuni og manninum heilt niðan í Steinatún, har parið síðani fekk hjálp frá øðrum.

Málið verður viðgjørd sum eitt harðskapsmál, og politiið arbeiðir víðari við hesum. Gerningsmenninir eru ikki tiknir enn, og orsøkin til álopið er ikki greið enn. Møguliga er talan um gamalt nagg, sigur vakthavandi á politistøðini. Og tann álopna, sigur vakthavandi, kenna teir á politistøðini sum ein hampuligan og friðarligan mann.

# Koyra kapp um Sandá

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Leygardagin fekk politiið í Havn fráboðan um ein bil, sum lá mitt í Sandá í Havnardali. Júst har, sum bilurin lá, var so djúpt, at vatnið stóð heilt upp til rútarnar á bilinum. Viðkomandi, sum boðaði frá, visti ikki um nakar var í bilinum.

Tá politiið kom á staðið, dugdu teir ikki at síggja nakran í bilinum, og boð vóru send eftir brandbilinum, sum hálaði bilin úr ánni. Tað vísti seg, at ongin persónur var í bilinum. Forrúturin var brotin, og bilurin sjálvur er oyðilagdur av øllum vatninum.

– Tað vísir seg, at ungdómar hava til fragd at koyra rallykoyring við gomlum bilum við nummarplátum, oman ímóti ánni og yvir um ánna, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn.

– Og hetta var eitt slíkt dømi. Men bilurin hevur bara ikki klára yvirum ánna.

Persónurin verður ákærdur fyri ikki at hava boðað løgregluni frá og fyri ábyrgdarleysa koyring, og kann tí vænta sær eina bót.